# Føroyingur rændur í Kastrup



*Ein ungur føroyingur varð í Kastrup rændur av trimum vápnaðum monnum*
*Mynd: Modellmynd/Jens Kristian Van*

**Ein 25 ára gamal føroyingur varð saman við einum hjúnum rændur av trimum vápnaðum monnum**

RÀN
*Heri á Rógvi*

Ein ungur føroyingur kom fyri stuttum aftur til Føroya við heldur døprum ferðaminnum. Maðurin, sum sambært danski løgreglu er fimmogtjúgu ára gamal, búði hjá familju í Kastrup – eini tilkomin hjún. Náttina millum sunnudag og mánadag um eitt tíðina koma tríggir óbodnir gestir á gátt. Teir vóru íklæddir húgvur um alt høvdið, og teir vóru vápnaðir. Hetta upplýsir løgreglan í Tårnby.

Upplýst verður, at vindeygu í sovikamarinum hjá hjúnunum stóðu opin, og innbrótstjóvarnir eru komnir inn í húsið á henda hátt.

Løgreglan upplýsir, at hjúnuni fyrst vórðu sligin hótt av vápnaðum tjóvunum. Síðani tvingaðu teir mannin at læta pengaskápið í húsunum upp.

Tann vitjandi føroyingurin verður bundið niður við sínari egnu reim og klæðum, og hann verður eisini sligin, upplýsir løgreglan í Tårnby. Tjóvarnir stjala bæði úr pengaskápinum og frá 25 ára gamla føroyinginum.

Frá Tårnby løgregluni frætta vit, at tey enn ongi spor hava at ganga eftir, men roknað verður við, at tjóvarnir verða fangaðir. Tílík innbrot eru óvanlig, verður upplýst.

Verða tjóvarnir fangaðir, kunnu teir rokna við harðari revsing.

Tað verður ikki upplýst, hvør føroyingurin er, ella hvussu nógvur peningur og annað varð stjolið.

# Flogferðslan í rættlag

**Flúgvingin til og úr Føroyum skuldu verið komin í rættlag aftur eftir fleiri dagar við ringum veðri**

FLOGFERÐSLA
*Heri á Rógvi*

Føroyska summarveðrið mekir oftani mjørka, og hetta føla serliga ferðafólk, sum ferðast loftvegis, á sín kropp.

Hesar seinastu dagarnar hevur flogferðslan í Vágum verið ávirkað av mjørka, ringum veðrið og tekniskum trupulleikum.

Hósdagin í síðstu viku stóð heilt illa til, tí flogfarið hjá Maersk air ikki fett sett seg í Vágum. Trupulleikar hava eisin verið í hesari vikuni. Flogførini til Føroya fáa ikki sett seg, og tískil sleppa fólk heldur ikki við flogfarinum avstað aftur.

Av Maersk-air skrivstovuni í Føroyum frætta vit, at alt nú er komið í rættlag. Sagt verður, at týsdagin varð flogvið somikið, at tey aftur fáa hildið seg til ferðaætlanina.

Tað hevur serliga verið Maersk-air, sum ikki hevur fingið lent í Vágum. Men oftani fær Atlantic Airways sett seg. Hví so er, vil dagligi leiðarin hjá Maersk í Føroyum ikki gera stórvegis viðmerkingar til.

–Vit taka ongar kjansir, sigur Thomas, leiðari hjá Maersk í Føroyum, sum sigur seg ikki kunna gera nakrar gitingar um, hví Atlantic fær lent, men leggur eina við, at hann ikki sipar til, at kappingarneytin tekur kjansir.


JOHN's RESTAURANT
Saltangará - Tel / fax 44 86 90
G! FESTIVAL TILBOÐ
fríggjadagin og leygardagin
Frá kl. 18.30 - 23.00
Franskur búffur við persillusmør
ella
Piparbúffur við piparsós
Verður borðreitt við grønmeti og bakaðum eplum
kr. 155,-
Opið er:
mánadag - hósdag kl. 11.30 - 16 & 18 - 22
fríggjadag og leygardag kl. 11.30 - 16 & 18 - 23
sunnudagin er opið allan dagin
Tygum kunnu bíleggja borð á tel 44 86 90

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
Hygg her!
AIRPORT STEAK
við kipsi og persillusmøri ella bearnaisesós og broysknum salati
bara 78,-
HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 - FAX 33 23 10
T-Postur: hotel@ff.fo

BÍLEGG PIZZA FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

Isaksen's Bussar
44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87
Booking:
Tel. +298 44 16 87
Fax. +298 44 18 87
E-mail: kiki@post.olivant.fo
* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *
Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.

fk Matseðilin
Hósdagin 17.juli:
Stokt flesk v/persillusós
Fríggjadagin 18.juli:
Minuttbúffur
Leygardagin 19.juli:
Oksasteik
Mánadagin 21.juli:
Milliónbúff
Týsdagin 22.juli:
Knettir
Mikudagin 23.juli:
Karbonadir
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 20,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík





AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkort
Føroya Tele Kall
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

YERTSHÚSIÐ
[ Fríggjakvøldið 18. juli ]
[ VÍSUKVØLD ]
Robert McBirnie & Jógvan Dahl - Duo
Niels Midjord, Per Sorman og Nigel Hallet
YERTSHÚSIÐ
hjá Restorffs · tel 31 48 48

FRÍGGJAKVØLDIÐ 18. JULI
Discoteque
v/OTTAR Í FUNNINGSSTOVU
KONUFÓLK ÓKEYPIS ATGONGD ÁÐRENN KL. 01:00
LEYGARKVØLDIÐ 19. JULI
Discoteque
v/Ottar í Funningsstovu
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00
PLATFORM discoteque
VINN EINA FERÐ VÁGAR - KEYPMANNAHAVN T/R INNI Á WWW.PLATFORM.FO
MAERSK AIR

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Sørvágur - Tórshavn kl. 23.00
• Miðvágur - Tórshavn kl. 23.15
• Sandavágur - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vágar kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254

Fríggjakvøldið 18. juli:
DJ Eyðfinn Drewsen
Tað nýggja og góða
Leygarkvøldið 19. juli:
DJ Eyðfinn Drewsen
RETRO NIGHT: Best of the 80'ies & 90'ies
opið er:
fríggjadag 23.00 - 04.00
leygardag 23.00 - 04.00
club20 discoteque

Kaggin
Hóskvøldið spæla
Take Off
Double Up 21.00 - 22.00 – ókeypis atgongd
Í vikuskiftinum spæla
TAKE OFF
www.kaggin.fo

FELAGIÐ TÓRSHØLL
Í vikuskiftinum spæla:
Flúrar
Ókeypis atgongd fríggjakvøldið til kl. 01.00
Bíligar eindir allar dagar

í býin?

Ja... soleiðis smakkar success !
GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant
Nýtt navn - nýggj matskrá • Opið hvønn dag frá 12-14 & 18-22 • Hotel Føroyar • Tel 31 75 00